




# Vælferð til øll



Val X
SOFUS DEBES JOHANNESEN
Javnaðarflokkurin

Javnaðarflokkurin er ein flokkur, ið byggir á frælsi, javnstøðu og samhaldsfesti. Vit virka fyri frælsi frá fátækt og kúgan, javnstøðu fyri øll, soleiðis at øll hava somu møguleikar og skyldur og samhaldsfesti í sínámillum ábyrgd millum allar borgarar.

Javnaðarflokkurin vil framhaldandi arbeiða fyri einum tryggum heilsuverki, sum m.a. kann veita viðgerðartrygd innan 2 til 6 vikur eftir staðfesting av sjúku og betri uppafturvenjing av mistum førleika.

Ein av hornasteinunum í framhaldandi betranini av heilsuverkinum er menning av heilsustarvsfólkum og samskipan av tænastum.

Vit vilja veita sjúklingatrygd og arbeiðsskaðatrygging. Sjúkrakassagjaldið skal avtakast og fíggjast umvegis skattin. Hetta gevur hvørjum persóni í meðal 200 kr. um mánaðin meira at ráða yvir.

Betri fólkaheilsa hevur verið ein av hornasteinunum í politikki javnaðarfloksins seinnu árini, og hesum máli vilja vit framvegis arbeiða fyri. Tí skjóta vit upp, at mvg-ið verður tikið av frukt og grønmeti, so hesar vørur, ið eru lutfalsliga dýrar í Føroyum, gerast bíligari.

Ein góður fólkaskúli er grundarlagi undir allari menning í landinum. Vit hava ein góðan skúla og Javnaðarflokkurin vil leggja stóra orku í at gera hann enn betri. Hetta verður m.a. gjørt við at betra læraraútbúgvingina, so hon verður ein kandidatútbúgving. Samstundis skulu verandi lærarar hava góð eftirútbúgvingarskeið, so teir koma upp á sama støði sum komandi lærararnir.

Økistilboðið til børn við serligum tørvi verður útbygd og tvílæraraskipan verður skipað í byrjunarundirvísingini. Vit vilja eisini leggja stóra orku í at útvega meira føroyskt tilfar til børnini, tað verið seg bæði bøkur, filmar og spøl.

Barnsburðarfarloyvi skal longjast upp í eitt ár, harav 3 mánaðir eru til pápan, eins og tímalønt foreldur skulu hava lønarendurgjald við barnsins fyrsta sjúkradegi.

Stakir uppihaldarar skulu hava barnaískoyti, eins og tey skulu hava dupultan lestrarstuðul.

Hetta eru bert nøkur av málunum, sum Javnaðarflokkurin hevur sett sær fyri at røkka í komandi valskeiði, so tað hevur týdning, at flokkurin fær tín stuðul.

Vælferðin kemur ikki av sær sjálvari – vel tí Javnaðarflokkin leygardagin!

# Hvagar gongur leiðin?



Val X
ÓLUVA KLETTSKARÐ
valevni Tjóðveldis

Eg eri fleiri ferðir spurd, hvørji hjartamál míni eru. At siga mentan og framburður, tað nyttar lítið, nú allir politikararnir eru um at vakna og lova bæði í eyst og vest.

Eg síggi samfelagið sum eina organiska eind. Henda eind stendur eftir mínum tykki á fýra beinum, ið sjálvandi stuðla hvørt annað, og sum halda øllum uppi:

Skúli, mentan, vinna og gransking

Í fólkaskúlanum eiga vit at seta okkum yvirskipað mál fyri fakligu menning næminganna. Øll børn í Føroyum eiga at hava somu atgongd til skúlan á jøvnum føti. Við landafrøðiligu og demografisku viðurskiftum okkara er tí neyðugt við einum útjavningargrunni, ið tryggjar øllum børnum somu fakligu avbjóðingar og hentleikar. Í skúlahøpi eru skúlabøkurnar so alneyðugar, heilt frá barnagarði til miðnámsstøði, at hetta onki annað er enn stór skomm!

Málrøktarnevndini eiga vit umgangandi at geva ans. Vit skulu hava størri tónleikalív og í minsta lagi eisini á universitetsstøði. Vit eiga beinanvegin at skipa fyri, so marknaðarføring av mentan okkara verður skipað, og peningur settur av til hetta. So kunnu øll listafólk fáa veruligan møguleika at liva av sínum førleika.

Vit skulu fáa Fróðskaparsetrið til eitt altjóða universitet. Vinna og gransking eiga at finna betur saman í hesum høpi, men tað almenna skal fíggja eina støðisgransking, so vinnan ikki einsamøll ger av, hvørji viðurskifti eru verd at fáast við. Vit skulu soleiðis skipa eitt granskingarumhvørvið, ið hóskar okkara umstøðum og ynskjum.

Hesi viðurskifti eru øll gagnlig bæði fyri einstaklingin og samfelag. Og á henda hátt fáa vit allar teir vælútbúnu sum óútbúnu føroyingar heim aftur, sum okkum leingist eftir. Hetta fer at menna samfelagið.

Um vit ikki ynskja broytingar, so er bara at lata standa til .... Tí ov lítið munagott er hent á fleiri av hesum økjum í langar tíðir: vit standa enn á einum beini.

Men ynskja tit broyting í hesum viðurskiftum, so eri eg sinnað at bjóða av í tinginum.

# Grøni bilurin



Val X
RÓGVI NYBO
Tjóðveldi

Avgjaldið á umhvørvisvinarligar bilar eigur at lækkast ella avtakast. Orsøkirnar til at stremba eftir hesum eru fleiri í tali.

Eitt av átøkunum fyri umhvørvið, ið vit kunnu og eiga at gera, er at lækka ella strika avgjaldið á umhvørvisvinarligar bilar. Við at gera hetta, so eru vit við til, samstundis sum vit minka um $CO_2$ útlátið, eisini við til at arbeiða fram móti null-hugsjónini.

Tá vit ungu, sum fyri stuttum hava fingið koyrikort, skulu út at keypa okkara fyrsta bil, er eyðsæð at vit hyggja eftir prísinum. Tey flestu av okkum hava næstan ongan kapital uppspart, og mugu tí hyggja eftir teimum heilt bíligu bilunum, og hesir eru allir gamlir bilar, millum 8-18 ár. Men trupulleikin er, at hesir bíligu bilarnir oftast eru sera dálkandi, umframt at teir yvirhøvir ikki uppfylla tey trygdarkrøv, ið verða sett nýggjari bilum.

Tí eiga vit at minka avgjaldið á umhvørvisvinarligar bilar, soleiðs at tey, ið fyrstu ferð fara at keypa sær bil, hava møguleikan fyri at keypa ein tryggan OG umhvørvisvinarligan bil. Avgjaldið eigur at strikast heilt, ella ásetast eftir hvussu nógv gram av $CO_2$ útláti teir hava pr. koyrdan kilometur (g/km).

Umframt at hetta eisini kemur okkum, sum fyrstu ferð skulu keypa bil, sera væl við, so kemur hetta eisini ungum familjum, har pengarnir ikki strekkja serliga langt, væl við. Soleiðs høvdu eisini tey kunna bjóða sínum børnum ein tryggan bil at koyra í.

Hetta átakið verður framt í øllum øðrum londum kring heimin, og er eitt megnartak, bæði fyri umhvørvið og fyri null-hugsjónina.

Hesum vil eg veruliga virka fyri, um tú setir tín kross við meg tann 19. januar

X við E

# Vil tú koyra í ring við ABC – ella føra Føroyar framá við E



Val X
HEIDI PETERSEN
Tjóðveldi

Valið snýr seg í stóran mun um eitt val ímillum at samfelagið framhaldandi skal mala runt í ring næstu fýra árini, uttan mál og mið, uttan stýring og uttan at nakar setir sær mál fyri vælferð, útbúgving og umhvørvinum.

Vil tú hava flokk á ting sum hevur sum fremsta mál at arbeiðir fyri teimum veikastu bólkunum í samfelagnum, og geva vælferðini innihald, so velur tú Tjóðveldi. Flokkurin vil skipa betri umstøður hjá støkum uppihaldarum, vil fáa lægstu fyritíðarpensjónina burtur, so tey ístaðin fáa miðal fyritíðarpensjón, og vil skapa ein rúmligan arbeiðsmarknað, har eisini rúm er fyri fólki sum bera brek, so velur tú Tjóðveldi.

Vil tú hava ein flokk á ting sum hevur sum mál at satsa uppá útbúgving og gransking við fleiri resursum til hesi øki og einum altjóða universiteti, so velur tú Tjóðveldi.

Vil tú hava ein flokk inn á ting sum vil seta fokus á umhvørvisspurningar, seta nýggja umhvørvislóg í gildi, revsa dálking av náttúruni og slóða fyri í heiminum við reinari orkunýtslu, so velur tú Tjóðveldi.

So valið stendur ímillum at koyra í ring við ABC
ella at føra Føroyar framá við E.
Sterk umboðan á Føroya Løgtingi.

X við E
Heidi P

Les meira á *www.tjodveldi.fo/heidi*

# Børnini eru framtíðin



Val X
ANN ELISABETH JOENSEN
Valevni Javnaðarfloksins

Familjan er kjarnin í samfelagnum, og familjan skal hava tað gott. Hevur familjan tað gott, so hevur samfelagið tað gott.

Stakar mammur og stakir pápar hava ikki nóg góð kor í Føroyum. Hetta gongur út yvir alla familjuna – ikki minst børnini.

Ein virkin familjupolitikkur skal eisini tryggja støkum uppihaldarum góð kor.

Øllum børnum í Føroyum skal tryggjast ein góður uppvøkstur og grundleggjandi rættindi.

Øll børn skulu hava eina góða byrjan í lívinum. Tí er tað týdningarmikið, at familjan hevur ein tryggan grundvøll at byggja á.

Tað er týdningarmikið, at stovnar og skúlar rúma bæði teimum veiku og sterku børnunum, og at fólk við útbúgving eru um børnini.

Vit skulu hava ein virknan barna-og ungdómspolitikk soleiðis, at tey, ið varða av politisku skipanini altíð eru dagførd um, hvussu okkara børn hava tað í samfelagnum.

Tað er neyðugt at gera kanningar og hagtøl, sum lýsa umstøðurnar hjá okkara børnum, um tað skal eydnast at hjálpa og fyribyrgja nógvum av teimum trupulleikum, sum nógv børn hava at dragast við.

Javnaðarflokkurin vil, at øll skulu hava ein tryggan grundvøll at byggja á.